# Eysturkommunu býráð

## Býráðsfundur verður hósdagin tann 13. juli 2017 kl. 14.00

**Fundarskrá:**

1. **17/00272**
   **2.viðgerð av eykajáttan juni 2017**
   Umsitingin mælir til at veita eykajáttan á íalt 2.650.000,00 kr., sambært fyriliggjandi yvirlitið og at peningurin verður tikin av innistandandi.

   Eingin broyting er frá 1. viðgerð.

   Fíggjarnevndin mælir til at veita eykajáttan eins og við 1.viðgerð.

2. **17/00265**
   **Uppskot um fíggjarligan stuðul til skúlagongd í framhaldsdeild í øðrum skúla**

   Brandur Jacobsen, býráðslimur, hevur sent fylgjandi uppskot til býráðið:
   *"Um næmingar sum ganga í framhaldsdeild t.e. 8., 9. og 10 flokki, velja annað skúlatilboð enn Fuglafjarðar skúla, letur Eysturkommuna gjaldið, sum kommunan hevði goldið um hann gekk í Fuglafjarðar skúla, fylgja næminginum."*

   Meirlutin í mentanarnevndini, Hans Mourits Foldbo og Hanna Jensen, mæla frá at taka undir við uppskotinum, tí arbeitt verður við at gera eitt nýtt skúlasamstarv um framhaldsdeild. Minnilutin, Brandur Jacobsen mælir til at taka undir við uppskotinum.

3. **17/00289**
   **Umsókn um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 199ab í Syðrugøtu**
   Eigari/ byggiharri av umsóknin hevur sent umsókn um byggiloyvi við frávik. Frávikið er staðseting av bilhúsi, skúri og pláss til ruskíløt.

   Umsitingin vísir á, at byggilinjan er 5,0 metur. Her verður bygd munandi nærri, men bilhúsið, skúrður og pláss til rúskíløt, sum skal byggjast nærri vegnum og í vegin, er undir og ájávnt við veghædd. Hertil er at siga, at pláss er til fleiri biliar á matriklinum og bilhúsið er parallelt við vegin.

   Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at fylgja byggisamtyktini og byggilinjuna sambært treytunum.

4. **17/00300**
   **Umsókn um marknaumskipan matr. nr. 300, 301 og matr. nr. 302 í Leirvík**
   Umsókn í sambandi við at partur av matr. nr. 301 og 302 skulu leggjast til matr. nr. 300 í Leirvík.

   Umsitingin mælir til at viðmæla marknaumskipanina

   Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at viðmæla marknaumskipanina.

5. **17/00301**
**Umsókn um marknaumskipan matr. nr. 285, 311a, 311b og matr. nr. 305 í Leirvík**
Umsókn í sambandi við at matr. nr. 285, 305, 311a og 311b skulu leggjast til matr. nr. 304 í Leirvík.

Umsitingin mælir til at viðmæla marknaumskipanina

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at viðmæla marknaumskipanina.

6. **17/00259**
**Umsókn um marknaumskipan matr. nr. 306 og matr. nr. 330 í Leirvík**
Umsókn í sambandi við at garður/havi sum í dag er í báðum ogninum, verður lagt saman til ein matrikul.

Umsitingin mælir til at viðmæla marknaumskipanina

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til góðtaka marknaunskipan av matr. nr. 306 til matr. nr. 330 í Leirvík.

7. **17/00268**
**Umsókn um marknaumskipan matr. nr. 173 og matr. nr. 16 í Syðrugøtu**
Umsókn um marknaumskipan í Syðrugøtu fevnir um úthús/hjallur sum er bygdur á matr. nr. 173 sum er uml. 20 $m^2$ og verður lagt til matr. nr. 16.

Umsitingin mælir til at viðmæla marknaumskipanina.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til góðtaka marknaunskipan av matr. nr. 173 til matr. nr. 16 í Syðrugøtu.